## DAGSINS MEINING

# David og Goliat

Hann minti mest um dystin millum David og Goliat - fótbóltslandsdysturin millum týska risan og føroyska pinkulingin. Hóast okkara Dávidar ikki megnaðu at fella týsku kempurnar, so raktu vit tær tó so meint, at ein av heimsins bestu fótbóltstjóðum fór særd av aftur vøllinum. At spæla 2-1 móti Týsklandi við møguleika fyri at javna móti endanum av dystinum er kanska tað størsta bragdið, sum okkara landslið og fyri tað nakað føroyskt ítróttarlið hevur fingið nakrantíð í ungu ítróttarsøgu okkara.

Neyvan nakrantíð hevur tann føroyska tjóðin staðið so nógv saman sum í stórdystinum móti Týsklandi mikukvøldið. Neyvan nakrantíð áður hava so nógvir føroyingar fylgt eini ítróttarkapping í sjónvarpi og útvarpi sum hetta søguliga kvøld, har vit fyri fyrstu ferð spældu móti Týsklandi, sum hevur verið heimsmeistari fleiri ferðir og gjørdist silvurvinnari til seinastu HM-kapping. Og hóast vit ikki megnaðu at vinna var ósigurin so lítil, at vit í veruleikanum "vunnu". Vunnu frama, áhuga og virðing ikki minst millum tær milliónir av týskarum, sum sóu dystin. Hetta var eisini í aðrar mátar ein sigur fyri okkum – fyri tað sjálvsálit og ta sjálvsvirðing, sum ungu spælarar okkara góvu sær sjálvum og øllum landsmonnum sínum.

Her var ikki talan um eitt einmansavrik, hóast málverji okkara skaraði framúr. Hann var fantastiskur. Men her var í veruleikanum talan um eitt liðavrik av teimum allar bestu. Eitt vælspælandi føroyskt lið vísti aftur og aftur, hvussu langt kann røkkast við sjálvdisiplin og við at halda høvdið kalt ein heilan dyst. Sjálvandi vóru brek og ting at fýlast á. Men tey eiga vit at lata fara. Ungi fótbóltsalvin úr Klaksvík mundi sett Føroyar á allar heimsins blaðforsíður. At hann ikki skoraði eigur ikki at liggja honum til last. Hann var bara millimetrar frá. Vit hava ikki loyvi til at vera misnøgd við úrslitið og henda misbrúkta málmøguleika, tá tað samanumtikið gekst nógv betur enn nakar hevði torað at droymt um.

Landslið okkara eigur tøkk og heiður uppiborið. Tað er enn einaferð við til at seta okkara tjóð á heimskortið. Hetta úrslitið eigur at geva okkum øllum uppaftur størri sjálvsálit men samtíðis eisini fáa okkum til at virða og menna tað, sum landsliðið stendur fyri. Í veruleikanum er landsliðið okkara besta søluvøru, tí eiga vit at halda tí til og hjúkla um tað. Nú eiga vit at seta okkum sum mál at vinna komandi dystir. At vinna móti Týsklandi í Føroyum eigur at verða næsta málið.

Tøkk til landsliðið, eingin nevndur eingin gloymdur. Tit eru okkara hetjur. Tit eru okkara vón. Góða eydnu víðari.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Góðan morgun, løgmaður



**Marius Dam, tingmaður**

Løgmaður er nú vaknaður. Eftir at hava ligið í dvala í 5 ár. Ella skal nú aftur kannast og kannast, so at onki hendir?

**Ongan løgmann:**
Seinastu 5 árini hava vit ongan løgmann havt, stórt sæð. Varaløgmaður hevur unsitið løgmansembætið. Hjá sjálvum løgmanni hava undanførslur verið reglan og ikki undantakið. Inntøkurnar hava verið stórar. Og skatturin uppaftur meiri øðiligur.

Onki er hent fyri at lækka skattin at kalla. Og onki hevði hent, um ikki andstøðan tók um endan.

Men á nøkrum økjum er nógv hent.

**Miðfyrisitingin:**
Tá Agnes Lousie legði at kei, fullfermd, kostaði miðfyrisitingin 54 milliónir krónur. Eftir at Annfinn Kalsberg hevur staðið á brúnni í 5 ár, kostar sama fyrisiting 137 milliónir krónur. Vøksturin hevur verið ótálmaður og skaðiligur. Og samstundis tørvar privatu vinnuni arbeiðsmegi.

Føroyar kunnu stýrast av 3-4 landstýrismonnum. Men Annfinn Kallsberg nýtir nú hesar sessir til "beskæftighedsterapi" at styðja undir sín sess í Tinganesi - og teir eru nú heilir 9 í tali, 2-3 ferðir fleiri enn enyðugt.

Øll umsitingin hjá Høgna Hoydal eigur at verða niðurløgd beinanvegin - sum tað fyrsta. Hesi umráðir eigur løgmaður at taka sær av.

Við fleiri øðrum økjum er sama óskil.

**Almenni sektorurin:**
Innan almenna sektorin hevði undir øllum umstøðum verið neyðugt við ábótum og vøkstri. T.d. var neyðugt at pensiónir hækkaðu. Og íløgur í hava ligið á láni máttu og eiga at gerast. Her kunnu nevnast ábøtur í infrastruktur og t.d. Fiskivinnuskúli.

**Ríkisveitingin:**
Tað er nú púra greitt fyri øllum, at ríkisveitingin ongantíð átti at verið skerd.

Tað er mín hugsan, at hesi viðurskiftir áttu at verið tikin uppaftur við donsku stjórnina. Tí tað kann ikki vera rætt, at skeivleikar ið eru tiknir undir leiðslu av einum sovandi løgmanni, nú skulu kosta vælferð hjá gomlum, børnum, longri bíðilistar, at landsverkfrøðingurin steðgar upp o.s.v.

Hesin katastrofali feilur eigur at verða rættaður - um gjørligt.

**Skatturin lækkast:**
Drepandi skattatrýstið má lækkast fyri at bøta um kappingarføri. Skjøl eru útflýggja til tingmenn, ið greitt vísa, at Føroyar hava nógv hægsta skattatrýst í Europa - og Heiminum. Eitt tað besta gerast kann fyri at fyribyrgja at fyrisitingin hjá løgmanni ikki framhaldandi veksur ótálma, er at lata føroyingar hava meira eftir av tí peningi, ið teir forvinna. So sleppur vinnan møguliga undan at gjalda til fleiri Stýrir og yvirbygningar hjá Fólkaflokkinum, við alsamt økjandi skatti, frá teimum somu.

**Góðan morgun:**
– Eg skilji væl at løgmaður klórar sær í nakkanum - nývaknaður. Í bestu tíð í Føroyum gevur Fíggjarlógin gevur eitt reelt undirskot í 2003.Yvirskotið á fíggjarlógini er "kreativ bókføring". Undir leiðslu av løgmanni

– Ríkisveitingin minka við 1500 milliónum komandi valskeið - uttan konsekvensútgreiningar ella konsekvens. Undir leiðslu av løgmanni.

– Miðfyrisiting vaksin við 150 milliónum og almenni sektorurin við 1000 milliónum uppá 5 ár. Undir leiðslu av løgmanni.

– Skattatrýstið er tað hægsta í heiminum. Undir leiðslu av Fólkaflokksløgmanni.

**Míni ráð:**
Nú Harra løgmaður er vakin, fari eg at heita á hann um at viðurkenna sína ómegd. Leggið frá tygum, og lat aðrar við betri hegni sleppa til. Góðan morgun !

*Vinarliga Marjus Dam*

# Nei Henrik

**Gudmundur Joensen**
**270 Nólsoy**

So vítt til veggja skal tað ikki vera í Føroya Javnaðarflokki. Útsøgnirnar hjá Gerhardi Lognberg í Degi og Viku týskvøldi 15.10.02 vóru beinleiðis í andsøgn við bæði grundsjónarmiðini hjá Javnaðarflokkinum og valskránna hjá flokkinum til seinasta løgtingsval. Bæði tú og Gerhard Lognberg stillaðu upp og fóru til val við lyfti um, at: "...leggja dent á at menna umhvørvið fyri føroyskari mentan í øllum hennara fjølbroytni". Tit vóru samdir um, at: "Øll mentan grør úr skapandi vilja og fyritakssemi hjá tí einstaka og í felagsskapi." Føroya Javnaðarflokkur er ímóti, at politikarar leggja leggja seg út í, hvussu listarfólk velja at nýta teir pengarnar, sum teimum verða játtaðir á fíggjarlógini. Og hetta var undir viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003, at Gerhard sum løgtingslimur fyri flokkin úttalaði seg.

Eg haldi at tað er umráðandi, at Javnaðarflokkurin sum tann einasti roynir at seta seg upp ímóti hesari religiøsu uppøsingini, sum fer fram í Føroyum í dag. Hesin samanvavsturin av religiøsaru niðurgeringini av minnilutabólkum og Mao-líknandi sensurering av tí skapandi listini er skaðilig og skammilig fyri samfelagið. Eg veit ikki, hvat tað er fyri eitt samfelag, sum samgongan hevur ímynda sær, at einar sjálvsstøðugar Føroyar skula verða. Men Javnaðarflokkurin skal undir ongum umstøðum stuðla samgonguni í at royna at skapa eitt samfelag, har Miðflokkurin og ein partur av Fólkaflokkinum setir dagsskránna, tá tað snýr seg um mentan og siðalæru!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Tann gloymdi parturin í málinum um Als-gjaldið

**Rættiliga drúgvt orðaskifti tók seg upp, nú stýrið fyri Als hevur tikið avgerð um at lække inngjaldið við 0,75%. Fleiri landsstýrismenn royna at kanna sær lækkingina til onnur endamál m.a. til eina longda barsilsskipan, men enn hevur eingin grett orð um tey, sum skipanin veruliga snýr seg um - tey arbeiðsleysu.**



**Jóannes Eidesgaard**

Tá inngjaldið til Als lækkar, so er tað tí, at stýrið metir, at skipanin ikki longur hevur tørv á einum so høgum inngjaldið, sum tað fær. Als eigur í dag eitt stovnsfæ, sum táttar í eina hálva milliard, og tí er tað bæði rætt og rímiligt, at stýrið nú tekur avgerð um, at inngjaldið skal lækkast. Skipanin er væl konsoliderað, og arbeiðsloysið er tað minsta síðan áðrenn kreppuna.

Rættiligt orðaskifti hevur síðan tikið seg upp um, hvat lækkingin uppá 0,75% skal brúkast til. Landsstýrismenn hava roynt at kanna sær lækkingina til onnur endamál, men lækkingin kann ikki av sær sjálvum beinast til eina aðra skipan t.d. barsilsskipanina. Ein lækking kann ikki markast til annað endamál. Lækkingin ger, at løntakarar og arbeiðsgevarar sleppa 0,75% bíligari, so stutt er tað.

Annað er so, um landsstýrið ætlar sær at brúka hetta sum eitt høvið til at áleggja pørtunum nýggj gjøld. Men tað er so upp til løgtingið at gera tað av.

Men eitt er, sum undrar meg í hesum orðaskifti. Og tað er, at hvørki stýrið og enn minni landsstýrið hevur havt frammi møguleikan at hækka útgjaldið til tey arbeiðsleysu, nú skipanin hevur ráð til tað. Útgjaldið varð í síni tíð sett til 70% av einari arbeiðsmannaløn, tí skipanin var undir hørðum trýsti av tí stóra arbeiðsloysinum, sum tá valdaði. Men hetta er tíbetur broytt.

Eg veit fullvæl, at fakfelagsumboðini í stýrinum hava havt líknandi uppskot frammi, tó uttan at tað hevur fingið undirtøku í stýrinum. Men tað kennist eitt sindur kollut í dag bert at tosa um, at inngjaldið skal lækkast, tí pengarnir flóta yvir í Als, og so als ikki at taka útgjaldið við.

Enn tosa vit um, at ein arbeiðsleysur bert fær 70% av einari arbeiðsmannløn. Tí vildi eg mett tað sum eina virðiliga markering av 10 ára degnum, nú Als hevur 10 ár á baki, at útgjaldið verður hækkað út 70% upp í 80%. Ein slík hækking hevði kostað skipanini góðar 8 mió. kr. m árið.

Hetta krevur sjálvsagt, at løgtingið lóggevur um hækkingina, men gagnligt hevði tað verið fyri kjakið, at eisini stýrið fyri Als og landsstýrismaðurin í vinnumálum høvdu peikað á slíkt uppskot.

# Ongin á brúnni, sjálvstýrarin stóð til

**Edmund Joensen**



Ein loysingarsamgonga hevur nú aftur roynt seg í góð 4 ár. Boðað varð frá, at nú skuldu allir føroyingar uppliva, hvussu ein fullveldisfíggjarlóg sær út og hvussu hon virkar.

Samfelagið skuldi skerast til eftir føroyskum leisti. Ongin skuldi merkja yvirtøkur og niðurskurðin í ríkisveitingum yvirhøvur. Heldur var tað sagt verða ein fyrimunur at sleppa av við ríkisveitingarnar, tær vóru bara haft um beinið og til stóran skaða, vóru loysingarmenn samdir um. Bestu serfrøðingar hjá landstýrinum høvdu roknað og sagt alt hetta og nógv afturat. Aftaná kann ein ikki lata verað við at samanbera við fíggjarkreppurnar í USA har júst serfrøðingarnir høvdu meira enn ein fingur við í spælinum.

Vit í sambandsflokkinum ávaraðu staðiliga loysingarflokkarnar og vístu á avleiðingarnar av teirra høpisleysu ætlanum. Vit vístu á, at hetta kom at verða til óbótaligan skaða fyri føroyska samfelagið. Vit vistu eisini hvat vit tosaðu um, tí vit høvdu júst tikið upp eftir húsagangin hjá loysingarflokkunum í 1992.

Men hvat er so hent síðani? kunnu fólk spyrja. Er nøkur fullveldisfíggjarlóg at síggja? Eru nakrar serføroyskar loysnir skornar, sum gera at ongin kemur at merkja yvirtøkur og niðurskurin í ríkisveitingum yvirhøvur?

**Fíggjarlógin er løgd fyri løgtingið**
Tá íð rakstur, íløgur og avdrøg er goldið, sigast 2 milliónir leypa av á løgtingsfíggjarlógini fyri 2003.

Tá er 50 mijóna skattalættin hjá Fólkaflokkinum ikki við. Nógv ymisk arbeiði ikki við, sum td.- vegurin Gamlarætt,- Strendur/Skála,- trygdin í Eysturoyar tunlinum, -Oyra vegurin, -Gásadals tunnilin, -tunnilin til norðuroyggjar, -Postverkið, -Svf, -Vags Havn,- bakkaverja í Sumba o.s.fr. o.s.fr. Landstýrismenn og løgtingsmenn hava síðani kappast um at fortelja, at hesi mál koma eisini við. Samgonguskjalið verður havt á lofti í sambandi við skattalættan. Postverkið var útigloymt í meldrinum, hetta skal við sambært landstyrismannin og løgmann. Svf var ikki búgvið áðrenn fíggjarlógin var løgd fyri tingið, men kemur eisini við seinni sambært landstýrimannin, o.s.fr. o.s.fr. "Det greyer seg í sjøen." sum ein tingmaður tók til undir fyrstu viðgerð.

**Ongin á brúnni, sjálvstýrarin stóð til**
Við hvørt hoyra vit í fjølmiðlunum, at skip hava siglt á land og at sjóforhoyr hevur verið. Orðsøkin hevur meira enn ta einu ferðina verið stutt og greið, "Ongin á brúnni, sjálvstýrarin stóð til". Soleiðis tykist tað okkum, sum hava fylgt við hesi góðu 4 árini óskilið hevur vart.

Hyggja vit eftir samfelagsgongdini, so síggja vit sanniliga at sjálvstýrarin hevur staðið til. Samfelagið kostar 1.150 milliónir kr. meir at reka í dag, enn tá íð fullveldislandsstýrið tók við í 1998. Samlaða fíggjarlógin er hækkað úr 2,5 mij, uppí 3,6 milliardir kr. Bara raksturin er hækkaður út ímóti líka nógv sum allur landskatturin í miðal hesi árini hjá øllum føroyingum tilsamans. Hetta er jú onki minni enn ein vanlukka.

Ongin skeran til eftir føroyskum leisti, ongin fullveldisfíggjarlóg í eygsjón. Hetta kemur ikki bak uppá okkum í Sambandsflokkinum, tí ryggurin á teimum leiðandi er sum í høgguslokki.

Yvirtøkur og minkan av ríkisveitingum hava higartil kostað føroysku skattaborgarunum umleið 400 miljónir í frumintøkum um árið. Ikki kan sigast annað enn, at hetta er ein sera vánalig handfaring av fíggjarviðurskiftum føroyinga og ein sera skeiv gongd øll árini.

**Játtanarreglunar ikki hildnar**
Undirbudgetteraðar útreiðslur á fíggjarlógini hevur verið meginreglan síðan loysingarlandstýrið tók við. Eykafíggjarlógin, sum var minka niður í litið og onkið ella slakar 12. milliónir í 1997, er síðan vaksin ár undan ári, og var uppí á 207 milliónir kr. seinasta ár.
Tað er nú eisini vorðin fastur regul at flyta fram frá einum ári til annað fyri at sminka komandi fíggjarlóg.

Hetta er td. fráboðað í sambandi við Norðoyartunnilin, sum ikki er á fíggjarlógini yvirhøvur.

Hetta er gongdin bestu inniløguár í Føroya søgu. Hvussu verður skilið, tá íð konjunkturarnir svinga aftur til tað meira normala, fyri ikki at tala um beinleiðis vánaligar konjunkturar, tí tað vita øll at teir gera. Spurningurin er bert hvussu skjótt.

Eftir at ríkisveitingarnar eru minkaðar, eru frumintøkurnar frá blokkinum, nú aftur áleið tær somu, sum tær vóru árini 1985/88 tá íð Tjóðveldisflokkurin seinast hevði ábyrgdina av fíggjarmálum.

Varin fíggjarpolitikkur sigur landstýrismaðurin í fíggjarmálum, og samgongumenn kappast um at nikka.

Vit onnur kalla tað óforsvarligt, at sjálvstýrarin hevur staðið til síðan Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin tóku yvir landsins stýri. Spurningurin er, um sjálvstýrarin fer at standa til líka til tað brestur í klettin við øllum føroyingum umborð, eins og tað gjørdi í 1992.

# Skal kristni siðaarvurin burtur?

**Maria Jacobsen**

Tað hevur verið nógv at lisið í bløðunum seinastu tíðina, um skrásett parlag millum samkynd, siðsemisnevnd og fólkakirkjuna. Vanlig miðalhampafólk kenna seg kanska eitt sindur ótrygg við tónan í nógvum av hesum, tí ein hómar at tað sum ein partur av fólkinum vil, er at fáa kristna siðaarvin hjá føroyingum burtur. Nú siga summi kanska, at tað er at taka munnin ov fullan, men tað haldi eg ikki. Er man byrjaður at máa burtur av tí kristna støðinum, so fer skjótt at ganga niður á bakka.

Er kristindómurin vorðin so týdningarleysur fyri okkara land, at vit fara at velja humanismu ella kommunismu í staðin, um vit skulu skipa okkum sum sjálvráðandi tjóð?

Hevur tann kristni siðaarvurin ikki havt alstóran týdning fyri okkum? At tað hava verið fólk sum hava vilja nýtt tíð sína til at siga okkum frá kristna gleðiboðskapinum? Vit kunnu taka prestarnar í gomlum døgum. Teir ferðaðust í millum bygdir til gongu og í báti og settu lívið í váða viðhvørt, fyri at fólkið skuldi hoyra Guds orð. Prósturin kannaði á sínum rundferðum, at børnini høvdu lært tað tey skuldu, skrivað stendur: »Hesi orð…skalt tú prenta inn í børn tíni«.

Hetta rann mær í huga, tá eg í útvarpinum hoyrdi eina mammu siga, at hon ætlaði sær ikki at siga við børn síni, hvat hon helt vera rætt ella skeivt, børnini skuldu sjálvi finna út av, hvat teimum tykti. Tað ljóðar humant, men eg eri bangin fyri, at tey foreldur sum lata uppalingina til børnini sjálvi, koma at merkja tað onkuntíð.

Eg kom eisini at hugsa um tilburðirnar norðuri við Gjógv, tá ið 8-mannaførini gingu burtur. Petur Jacob Sigvardsen skrivar um hetta í Gjáar søgu, sum kom út í 2000.

Hann sigur frá, hvussu Hammershaimb, ið var próstur tá, legði leið sína norður til Gjáar, at vitja øll tey, sum sótu eftir við stórari sorg. Hann skrivar soleiðis: »Komin til bøðgarðin neig hann í knæ, hirðilin hjartagóði heitti bønarorð á hirðilin altvaldandi um at beina leiðina fyri øllum teim sorgarbundnu, ið innan fyri hendan garð vóru, til ta kelduna, har einans sálarbót er at oysa av«. Ógvuliga hjartanemandi, men hvat hevði verið at tikið til í slíkum løtum, um vit ikki áttu henda kristna siðaarv, sum so lítið verður virdur í dag.

Eitt er vist, tann Altvaldandi er til, um vit trúgva tí ella ikki, og vit eiga at minnast til at skrivað stendur: »Tí álvarsamur Gud, er Harrin Gud tín!«

Vit kunnu gera sum vit vilja, tað eru altíð nøkur val at gera her í lívinum, tað er eisini eitt val at liva samkyndur, og tað er sanniliga eitt álvarsligt val at gera landsins lógir soleiðis, at tær máa støði undan kristindóminum.